

## Royndu at rudda vøllin

Í gjárkvøldið royndu fólk at rudda vøllin í Streymnesi fyri kava, soleiðis at spælandi verður seinnapartin í dag.

Knappliga 40 fólk vóru møtt við spaka í hond, og klokkan átta var byrjað at gravað í nógva kavanum. Í ein tíma ella so gróvu tey so hugagóð, og nakað av kava fingu tey tikið oman av, áðrenn tey settu spakarnar. Sum skilst hevur nógva regnið í nátt hjálpt væl til, soleiðis at tað sindri sum nú liggur eftir, verður tikið burtur áðrenn steypadysturin millum EB/Streym og B71 ætlandi verður bríksladur í gongd kl. 17 í dag.

## Tofta-kavi í donskum miðlum

Kavin, sum liggur á Svangasgarði í løtuni, sæst aftur í donskum miðlum í hesum døgum. Bæði portalurin hjá Ekstra Bladet og fótbóltsheimasíðan bolddk.com skriva um "snekaos", sum sambært teimum valdar í Føroyum. Bolddk.com fer enntá so langt sum at siga, at: "Færøerne ligger simpelthen begravet i sne, og det vil kræve en næsten umulig indsats at blive klar til kampen".

Ekstra Bladet tekur ikki so dýran til, men staðfestir sum er, at "selvom døgraderne nu ventes at sætte ind på Færøerne, er det uvist om de store snemængder når at smelte til lørdagens planlagte kamp."

# Shevchenko & Co. í leysari luft

**Við evstamark okkara var enn ikki avgjørt, hvørt landsdysturin millum Føroyar og Ukraina skal spælast leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

**Bíða eftir fraklendingum**

UEFA hevði boðað frá, at skuldi talan verða um at flyta dystin, soleiðis sum FSF og Ukrainska fótbóltssambandi ynskja, so skuldu hini londini í bólkinum játtað hesum áðrenn klokkan 12 í dag. Føroyska ynskið er, at dysturin verður fluttur frá komandi leygardegi, og at hesin ístaðin verður spældur tann 22. august.

Beint undan evstamarki okkara høvdu vit aðalskrivaran hjá FSF, Ísak Mikladal, í telefonini, og hann sigur, at enn verður bíðað eftir svarið frá Fraklandi.

Roknast kundi annars við, at serliga Italia og Frakland møguliga høvdu áhuga í, at umstøðurnar hjá Ukraina vóru so vánaligar sum gjørligt, tá teir skulu spæla her. Hetta tí sannlíkindini fyri einum málleysum javnleiki tá helst eru størri. Men italska fótbóltssambandið hevur so játtað, at dysturin verður fluttur, so liggur kavabólturin í hondunum frá franska fótbóltssambandinum.



*Tað er enn ikki greitt, hvørt føroysku áskoðararnir sleppa at síggja ein av heimsins bestu fótbóltsspælarum nú leygardagin, ella um hetta má til august mánað, tá umstøðurnar til fótbólt vónandi eru betri.*

## Vilja brúka ÍF Føroyar

Føroyskir útisetar hava í nógv ár havt gleði av útisetafelagnum ÍF Føroyar. Og hóast tað kanska kann roknast við, at bestu føroyingarnir nú enda hjá Fremad Amager, so metir Todi á ongan hátt, at talan verður um kapping millum hesi feløg.

- Heldur vil eg siga, at hetta letur upp fyri fleiri áhugaverdum samstarvsmøguleikum. Ítøkiliga hava vit tosað um ein samstarvsform við spælaraskiftum. Bestu spælararnir hjá ÍF Føroyum kunnu væl hava potentiali til at røkka á besta liðið hjá Fremad Amager. Tí er upplagt, at hesir sleppa at fáa tann møguleikan, og gongur tað ikki, so er vegurin aftur til ÍF Føroyar jú sera stuttur. Og eisini kundi felagið verið eitt stað, har evnaríki føroyskir spælarar hjá okkum í eitt tíðarskeið komu til eitt felag, har teir fáa meira spælitíð. So hetta er avgjørt ein møguleiki, sum vit vilja troyta, sigur Todi.

**-mørk**

# Liðið hjá Boga vann FM

**Tvey tey síðstu umførini í liðkappingini í bridge vórðu spæld í skúlanum í Vági um vikuskiftið**

BRIDGE
*tíðindaskriv*

Spenningurin í 1.deild var stórur undan tveimum teimum síðstu dystinum. Tvey lið lógu fremst við sama stigatali, meðan eitt lið kom teimum á baki.

Liðið hjá Boga Simonsen og liðið hjá Allan- Dal Christiansen høvdu 149 stig á fyrsta plássinum.Liðið hjá Allan hevði tó betur innanhýsis skoru. Liðið hjá Símin Lassaberg lá á triðja plássið við 135 stigum.

Tá ið byrja varð fríggjakvøldið var mesti spenningurin um dystin millum Símin Lassaberg og Allan Dal-Christiansen, ið møttust. Liðið hjá Símin skuldi vinna dystin um teir skuldi hava møguleika fyri at vinna FM.

Tað sá eisini gott út hjá Símin, teir førdu við 25 imp, við hálvleik. Men so tóku Allan og teir sær um reiggj og smurdi Símin av, soleiðis, at Allan vann dystin 20-10.

Liðið hjá Boga hevði á pappírinum eina lættari skrá, teir møtti liðinum hjá Høgna Jacobsen, ið byrjaði kappingina so flott. Tað bleiv til stórsigur 25-0 til Boga, sum legði nakað av sjógvi millum seg og liðið hjá Allan.

Liðið hjá Allan spældi sín síðsta dyst móti Høgna Hansen. Allan skuldi vinna stórt um møguleikin at vinna FM skuldi varveitast. Hendan setningin megnaði teir til fulnar við at vinna 25-3.

Hetta gjørdist tó ikki nokk tí liðið hjá Boga hevði vind í seglinum og vann sín dyst móti Marjun Restorff við 25-2 og tískil varveittið liðið hjá Boga Simonsen FM-Heitið.

Á liðinum hjá Boga Simonsen eru umframt Boga sjálvan eisini, Hallberg Harnfríðsson, Hans Jacob Petersen, Rói á Røgvu Joensen og Jákup Hjaltalin.

## Bridge: Endastøðurnar

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Bogi Simonsen | 199 |
| 2 | Allan Dal-Christiansen | 194 |
| 3 | Símin Lassaberg | 166 |
| 4 | Høgni Jacobsen | 108 |
| 5 | Marjun Restorff | 115 |
| 6 | Hallur Ellingsgaard | 95 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jórun Johannesen | 204 |
| 2 | Óli Holm | 187 |
| 3 | Heðin Mortensen | 147 |
| 4 | Danny Danielsen | 132 |
| 5 | Jákup Egholm | 111 |
| 6 | KBI | 107 |